# VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen greiður frá um veðrið




**Veðrið í morgin:**
Gul til stívt andøvsgul av útsynningi, seinnapartin upp í ein strúk. Turt og sólglottar og hitin millum 12 og 15 stig.




**Veðrið leygardagin:**
Strúkur í vindi ella hvassur vindur av útsynningi og támut veður við regni ella sirmi av og á. Hitin millum 10 og 13 stig.




**Veðrið sunnudagin:**
Gul til stívt andøvsgul av útsynningi og sólglottar, men kanska okkurt ælið. Hitin millum 12 og 15 stig.

**Veðrið mánadagin og týsdagin:**
Gul til stívt andøvsgul av útsynningi og mánadagin okkurt ælið, men týsdagin yvirhøvur turt og sólglottar. Hitin millum 10 og 14 stig.

# 9 kilo tungur frensur

**Hann eitur Jolly, er 15 ára gamal og vigar 9 kilo, men hann gongur úti akkurát sum aðrir ferugir frensar**

**DJÓRALÍV**
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Hann er ein rættiligur Garfield – men bert tá tað kemur til tyngd.

Jolly gongur úti og melur millum aðrar kettur og frensar um dagarnar, men hevur einki ímóti at leggja seg bleytt, tá hann kemur til húsar heim.

- Hann er ein undarligur frensur. Einaferð hevði dóttir mín fingið ein dvørgahamstrara, og hon vildi, at Jolly og hamstrarin skuldu gerast vinir. Men ólukkutíð tók Jolly dvørgahamstraran í kjaftin og reyk síðani niður í kjallaran við honum. Dótturin grætt og illa læt um henda góða dvørghamstrara, men áðrenn vit vistu av, kom Jolly upp úr kjallaranum við hamstraranum og setti hann aftur á køksgólvið, spilllivandi, sigur Vilma Poulsen úr Nólsoy, sum eigur Jolly.

Um tað so hevur verið gráturin hjá dóttrini, ella um Jolly bara ikki dámdi hamstrakjøt kortini, er ikki til at siga, men dvørgahamstrarin bar so boð í bý hendan dagin.

Jolly er geldur nú, og fær tí ongan »skaða« gjørt í so máta. Men hóast síni 15 ár á baki er hann frískur og ferugur, og tað hann saknar í »kvinnuligum« upplivingum vigar hann upp ímóti, bókstaviliga, við nógvum og góðum mati.

So í so máta hevur hann eitt líka gott lív sum meiri kendi lagsbróðurin, Garfield.



*15 ára gamli Jolly dámar væl at slanga sær á bleytum undirlagi*
*Mynd: Michael Thomsen*

## Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | 5 |
| Nuuk | -- |
| Qaqortoq | 11 |
| Ammassalik | 6 |
| Saint John's | -- |
| Halifax | -- |
| Reykjavík | 8 |
| Seyðisfjørður | 9 |
| Tórshavn | 12 |
| Lerwick | 15 |
| Aberdeen | 19 |
| London | 19 |
| Tromsø | -- |
| Bergen | 19 |
| Oslo | -- |
| Stokkhólm | 19 |
| Keypmannah. | 17 |
| Helsinki | 15 |
| Moskva | 24 |
| Berlin | 14 |
| Warzawa | 19 |
| Kiev | 17 |
| Bukarest | 25 |
| Paris | 14 |
| Madrid | 30 |
| Róm | 27 |
| Malorca | 27 |
| Athen | -- |
| Malta | 33 |
| Tunis | 32 |
| Beijing | 29 |
| New Dehli | 34 |
| Bangkok | 34 |
| Jakarta | 31 |
| Sydney | 16 |
| New York | 27 |
| Miami | 31 |
| Los Angeles | 20 |
| Meksikobýur | -- |
| Panama | 29 |
| La Paz | 15 |
| Rio de Janeiro | -- |
| Buenos Aires | 17 |

## LUFTTRÝSTIÐ



**Í gjár:**
Eitt lágtrýst, 977 hPa. við Scoresbysund fer norðureftir og brúgvalagið yvir Føroyum fer eystureftir.



**Í dag:**
Hátrýstið vestan fyri Írland fer eystureftir og mennist. Tað gevur áhaldandi veður av útsynningi við Føroyar.

## HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 09/08 kl. 06⁰⁰ – 10/09 06⁰⁰. Hitin í gjár: 10,4°
Minsti hiti máldur í september: 0,4° - Mesti hiti máldur í september: 20,2°

## AVFALLIÐ




Avfallið: 0,0 mm – mált frá 09/08 kl. 06⁰⁰ – 10/09 06⁰⁰.
Avfallið higartil í september: 43 mm

javni
– Virkin og virðismikil
www.javni.fo

Alt um harmonikur



www.simme.eu

## VESTFALLSKYRRINDI

7. september Fyrra kvarter
Mánin longst frá jørðini
15. september Fullmáni
20. september Mánin næstur jørðini
22. september Seinna kvarter

Kelda. Álmanakkin 2008

| Dagur | Suðuroyar-/ Vágafirði fp. | Suðuroyar-/ Vágafirði sp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði fp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | Hestfirði/ Sundalagnum sp. | Vestmanna-sundi fp. | Vestmanna-sundi sp. | Mykines-firði fp. | Mykines-firði sp. | Nólsoyar-firði fp. | Nólsoyar-firði sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi sp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi sp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði fp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði sp. | Hvanna-sundi fp. | Hvanna-sundi sp. | Fugloyar-firði fp. | Fugloyar-firði sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 18. sept | 9:15 | 21:40 | 8:15 | 20:40 | 8:30 | 20:55 | 11:15 | 23:40 | - | 12:15 | 7:30 | 19:55 | 6:30 | 18:55 | 9:30 | 21:55 | 10:30 | 22:55 | 9:00 | 21:25 | 10:15 | 22:40 |
| 19. sept | 10:05 | 22:32 | 9:05 | 21:32 | 9:20 | 21:47 | - | 12:05 | 0:40 | 13:05 | 8:20 | 20:47 | 7:20 | 19:47 | 10:20 | 22:47 | 11:20 | 23:47 | 9:50 | 22:17 | 11:05 | 23:32 |
| 20. sept | 10:59 | 23:29 | 9:59 | 22:29 | 10:14 | 22:44 | 0:32 | 12:59 | 1:32 | 13:59 | 9:14 | 21:44 | 8:14 | 20:44 | 11:14 | 23:44 | - | 12:14 | 10:44 | 23:14 | 11:59 | - |
| 21. sept | 11:59 | - | 10:59 | 23:43 | 11:14 | 23:58 | 1:29 | 13:59 | 2:29 | 14:59 | 10:14 | 22:58 | 9:14 | 21:58 | - | 12:14 | 0:44 | 13:14 | 11:44 | - | 0:29 | 12:59 |

Lesið Sosialin